


# Øll oljan skal upp undan havbotninum

Jan Müller

04.06.2014 - 17:54

Oljan.fo

Í hugaheiminum hjá norska oljumálaráðharranum, Tord Lien, er eingin ivi um, at norðmenn eiga at taka alla oljuna undir norska havbotninum upp. Og so er hann sannførdur um, at norsk olju- og gassvinna fer ikki at skunda undir trupulleikarnar við veðurlagnum.

Tvørturímóti heldur hann, at gass er ein partur av loysnini, tí tess meiri gass heimurin brúkar, tess minni verður tørvurin á koli.

-Vit kunnu ikki lata oljuna verða liggjandi undir havbotninum, tí vit skulu brúka hetta virksemið til at fíggja vælferðarsamfelagið, sigur Tord Lien við Adresseavisen.

Ráðharrin var millum teirra, sum høvdu orðið á ráðstevnuni Oljeforum í Orkanger í gjár, og har var boðskapurin til vinnuna greiður:

-Oljuvinnan noyðist at skerja framleiðslukostnaðin, so at leiðir, sum ikki eru rakstrarverdar í dag, verða tað í framtíðini, segði Tord Lien, sum er av teirri áskoðan, at størri oljuvinna og minni útlát av vakstrarhúsgassi passa saman sum fótur í hosu. Hann vísir á, at fólkatalið veksur, at støðugt fleiri fáa betri vælferð, og at hetta økir tørvin á orku.

-Vit skulu minnast til, at vit mugu spenna okkum út fyri at varðveita 90 prosent av okkara verandi oljuframleiðslu, og mín hugsan er, at vit kunnu halda fram við oljuvinnuni og framvegis halda okkum niðan fyri hitamarkið upp á tvey stig, sigur Tord Lien við Adresseavisen.